Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 21. oktober 2005



**Tey skrivaðu søgu - Shimon Peres**

Í triðja partinum í samrøðurøðini hittir Steffen Kretz Shimon Peres, sum í meiri enn 20 ár hevur verið ein av teimum kendastu stríðsmonnunum fyri friði í Miðeystri. Í samrøðuni verður nógv prátað um Oslo-friðaravtaluna og hátíðarhaldið uttan fyri Hvíta Húsið, har Peres og Yassir Arafat í 1993 tóku lógvatak saman, meðan allur heimurin helt andanum.

**Sunnudag 23. kl. 21.10**



**Extras**

Nýggj skemtirøð við teimum báðum, ið gjørdu væl dámdu røðina "The Office", Ricky Gervais og Stephen Merchent. Hesaferð fer pínliga søgan fram í filmsídnaðinum. Extras snýr seg um statistar, sum eru til reiðar at gera alt fyri at fáa ein veruliga leiklut. Hvør partur fer fram undir upptøkum til ein nýggja film, har veruligar filmsstjørnur eru við.

**Fríggjadag 21. kl. 20.20**

**Ataturk - faðir at turkunum**

Nú Turkaland av álvara bankar á dyrnar hjá ES, sendir DR2 eina franska portrettsending um Mustafa Kemal, ið stovnaði lýðveldið Turkaland. Samstundis verður hugt afturá tíðina, tá ið Turkaland varð til. Tá ið Mustafa Kemal varð føddur í 1881, var Osmanska Ríkið í ferð við at syndrast, og eftir 1. Veraldarbardaga var nærum einki eftir av ríkinum.

**Mánadag 24. kl. 22.00**

TV Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**